# Koyritekniskt anlegg við hálkubreyt

**Í mong ár hevur verið tosað um, at tørvur er á einum koyritekniskum anleggi við hálkubreyt í Føroyum. Jákup Jacobsen, stjóri á Akstovuni, sigur, at hann ivast ikki eina løtu í, at stórur tørvur er á einum slíkum anleggi í Føroyum**



Modell av koyritekniskari breyt sum Akstovan eigur

FERÐSLUTRYGD
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Herfyri setti Annika Olsen, landsstýriskvinna, ein arbeiðsbólk at kanna møguleikarnar at gera koyritekniska breyt í Føroyum. Eftir fyrsta fundin varð Jákup Jacobsen, stjóri á Akstovuni, valdur sum formaður í bólkinum.

Jákup Jacobsen, sigur við heimasíðuna koyrilararin.fo, at hann ivast ikki eina løtu í, at stórur tørvur er á einum koyritekniskum anleggi í Føroyum. Tað er eisini ein grundleggjandi partur í ferðslufrálæruni, at næmingarnir fáa frálæru í einum sokallaðum "grulvigarði", sum er eitt innigirt øki, til teir fyrstu koyritímarnar í skúlavogni við grundleggjandi koyrifrálæru.

Í nýggju koyrifrálæruni stendur nevniliga, at øll sum skulu ogna sær eitt koyrikort skulu teir fyrstu tímarnar gjøgnumføra verkligu koyringina á einum slíkum øki. Sera týdningarmikið er eisini, at bilførarar læra síðsta part av útbúgvingini, sum er frálæra á einum koyritekniskum anleggi, og somuleiðis hvussu akfarið skal handfarast í hálku og undir torførum umstøðum yvirhøvur.

Spurdur um hvar eitt tílíkt anlegg eigur at liggja, svarar Jákup Jacobsen, at flestu koyriroyndirnar eru í miðstaðarøkinum, og tí er best at eitt anlegg liggur onkustaðni á tí økinum, og at staðið er veðurgott.

Jákup hevur heilt frá byrjan verið av tí áskoðan, at eitt komandi koyriteknisk anlegg skal vera á privatum hondum. Til spurningin um nær hann væntar at eitt anlegg stendur liðugt bygt, svarar hann at hansara realistiska boð er í 2015.



Jákup Jacobsen, stjóri á Akstovuni er valdur sum formaður í bólkinum, ið fyrireikar eina koyritekniska breyt

# Reyni Service á Svangaskarði



Sámal av Reyni, søluleiðari hjá Reyni Service

FRAMSÝNING
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Á kampingstevnuni á Svangaskarði verður ein framsýning hjá Reyni Service av brúktum og nýggjum bilum.

Sámal av Reyni, søluleiðari hjá Reyni Service, sigur, at av nýggjum bilum verða tað serliga bilar, ið egna seg væl til at trekkja kampingvognar, men eisini tey mest seldu modellini hjá Toyota sum t.d. Avensis, Corolla, Urban Cruiser, RAV4 og Yaris. Umframt at teir eisini at bjóða lagaliga bilfígging til bæði nýggjar og brúktar bilar. Sum nakað serligt fáa tey, sum keypa nýggjan bil á stevnuni, ein kampingkrók við í keypinum.



# Føroya størsta kampingstevna

Í vikuskftinum frá 11. -13. september verður kampingstevna á grasvøllinum á Svangaskarði.

Tað eru kampingfelagið Kamping.fo og B68, sum skipa fyri tiltakinum. Ein av fyrireikrunum, Jan Danielsen á Toftum, sigur, at ætlanin er, at hetta skal vera Føroya størsta kampingstevna, og verður hetta helst eisini seinasta tiltak av sínum slagi í ár.

Á grasvøllinum er sera gott pláss, so helst verður pláss fyri øllum kampingvognum og kampingbilum í Føroyum. Hentleikarnir av teimum allarbestu: El verður lagt á økið, vatn er eisini lagt til, umframt at umstøður eru til at tøma rottangan.

Skipað verður fyri felags hugnakvøldið í B-68 húsinum antin fríggjakvøldið ella leygarkvøldið.

Frá kl. 19 hóskvøldið ber til at koma á økið við vogninum/bilinum. Seinasta freist at koyra av aftur økinum er mánadagin.

Jan sigur, at hóast seinasta freist at tekna seg til stevnuna var mánadagin 7. september, er framvegis møguleiki at tekna seg við at senda teldupost til: jandan@post.olivant.fo ella ringja til 21 77 60 / 54 25 55.

*mg*

